## DAGSINS MEINING

# Skifti

Um alt gongur sum ætlað, er nýtt landsstýri valt, tá hetta blað er komið á gøtuna. Talan er um eitt skifti, men ikki um nakra koll-velting. Í stóra málinum um viðurskifti við Danmark verður sum heild hildin sama kós, sum hjá undanfarnu samgongu, og hetta er ivaleyst størsta diplkomatiska bragdið hjá fráfarandi løgmanni.

Broytingin er at finna á almannaøkinum og á vinnu- og búskaparøkinum. Tað tykist, sum nýggja samgongan tekur pensjónsmálið í størsta álvara, og má hetta sigast at vera eitt satt frambrot.

Pensjónsmálið hevur verið ein sonn marra tey seinastu mongu árini, og hetta mál má og skal loysast. Eisini familjupolitikurin verður lyftur upp og lætt verður um hjá barnafamiljunum. Hetta eiga øll at fegnast um.

Vinnu- og búskaparpolitikurin miðar ímóti at skapa hóskandi karmar um vinnuna uttan at geva studning. Hetta verður alt annað enn lætt, men kunnu flokarnir semjast, so skal tað nokk eydnast. Eitt er vist, ein stjórn kann ikki sita hendur í favn, meðan stórir partar av vinnuni skrambla saman. Kreppu-teknini eru sýnlig og seinastu tølini frá ALS vísa eitt skjótt vaksandi arbeiðsloysi. At hetta fyri stóran part stavar frá atgeraloysi og politiskari líkasælu hjá fráfarandi samgongu er óneyðugt at nevna.

Nú fer nýggja samgongan so til verka. Flokkarnir eru sera ymiskir, men teir tykjast uppsettir upp á at fáa tað at ganga. Alt veldst um samstarvsviljan og evnini, eisini bendir mangt á, at teir tríggir hava eitt felgas áhugamál í at fáa samstarvið at ganga. Teir vita, at landið tolir ikki meira klandur og ófrið. Tað er búskaparliga støðan heilt einfalt ikki til.

Vit ynskja nýggja landsstýrinum hepna hond og fara at venda aftur til politikkin í komandi oddagreinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vinstrivongur ongan góðan

**A. Guttormur Djurhuus**



**Lítil munur á flokkunum**
Í samband við løgtingsvalið, hava útlendsk tíðindafólk vitjað. Eitt sum hevur gjørt tey bilsin, er at so lítil munur er á føroysku politisku flokkunum.

Sjálvur kann eg bert halda við tíðindafólkunum. Samgongusamráðingarnar aftaná valið, vátta bert at so er. Javnaðarflokkurin, sum leiddi samráðingarnar, helt at at tað kundi loysa seg at tosa við allar flokkar á tingi um samgongu. Eingin av flokkunum varð hildin at vera so langt frá Javnaðarflokkinum, at mett var at møguleikar fyri samstarvi ikki vóru til staðar.

Tjóðveldisflokkurin, sum var mettur at vera mest frælslynti flokkur í Føroyum, sat í undanfarna landsstýri í samgongu við tveimum av mest ófrælslyntu flokkum í Føroyum. Og so einum afturat, sum letur seg brúka til hvat sum helst. Sig mær hvørjum tú kemur saman við og eg skal siga tær hvør tú er, sigur gamalt orð. Ikki gevur tað Tjóðveldisflokkinum gott skoðsmál.

Sostatt kann staðfestast at føroyska polittiska skipanin er ein savnan konturleysum amøbulíkum flokkum, har lítið skilur.

**Tørvur á nýggjum flokki**
Omanfyri sagda vísir greitt at stórur tørvur er á flokki við greiðari skrá, sum uttan himpr og uttanumtos, torir og vil siga hvar hann stendur í týðandi spurningum. Ein flokkur sum stendur savnaður í etiskum og moralskum spurningum og ikki, sum nú er, noyðir hin einstaka limin at taka støðu á økinum, fyri at sleppa flokkinum undan at vísa hvar hann stendur. Ella at hann ikki hevur nakra støðu.

Tørvur er einum flokki sum hevur greiða støðu til loysingarspurningin.

Einum flokki sum hevur greiða støðu til fosturtøku.

Einum flokki sum hevur greiða støðu til samkynd.

Einum flokki sum torir at nema við ES-spurningin.

Einum flokki sum ikki vil vevja saman átrúna og politikk.

Tað verður av nógvum hildið at vit hava ov nógvar flokkar frammanundan. Men Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálstýrisflokkurin eru so líkir, at teir eins væl kundi verið ein flokkur. Munurin millum flokkarnar er minni enn munurin millum veingirnar í somu flokkum.

Fyri mær at síggja er munurin millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin minkaður burtur í lítið og einki. Tó hevur Fólkaflokkurin léttari við at skifta ham.

Miðflokkurin skarar einsamallur framúr við einum greiðum boðskapi. Við at fáa sess í undanfarna landsstýri, fekk hann møguleika at fáa boðskapin út, og er tað helst frágreiðingin til at hann hevði framgongd á valinum.

**Vinstrivonguri slepptur uppá fjall**
Sporadiskar royndir, við misjøvnum úrsliti, hava verið gjørdar at stovna nýggjar flokkar. Tað hava verið mótmælisflokkar við eingari ella ógreiðari flokskrá. Teir hava tí syndrast eftir stuttari tíð, hóast onkur av teimum hevur havt hampuliga undirtøku, og fingið menn á ting.

Í dag laga flokkarnir skránna eftir hvat ið hildið verður at fólk flest ynskja og halda og sum gevur flest atkvøður, heldur enn at flyta fram ein boðskap. Hetta er orsøkin til at flokkarnir eru farnir at líkjast so nógv hvørjum øðrum at tú sær ikki munin. Uttan at verða valdur á ting kann tú lítið gera. Tí verður dyrgt eftir atkvøðum, sum av røttum hava heima í øðrum flokkum. Ein ampi við demokratinum.

Lat okkum slíta tey bond sum heimastýrislógin hevur fjøtrað okkum í, kundi duna frá eini tjóðveldisrødd fyri nøkrum árum síðani. Í dag er røddin spøk og ljóðar: Latum okkum tøma heimastýrislógina.

**Veljarafjøld uttan heimvist**
Sum nú er, er helst stór veljarafjøld á vinstraveinginum heimleys. Ikki fyrr enn vit fáa javnvág á politisku skipanini, við einum flokki á vinstraveinginum, hava vit møguleika at byrgja uppfyri at afturhald og átrúnaðarlig fundamentalisma breiðir seg í samfelagnum.

# Tímatalið í Sands skúla

**Olaus Jespersen**
*deildarstjóri*
*Mentamálaráðið*



Í grein í Sosialinum nr. 17 frá 27. januar 2004 ynskir Eli Hentze, skúlastýrislimur, alment svar um, hví Sands skúli hevur fingið boð um at taka nakrar tímar av tímatalvuni. Sum skilst av greinini, so hevur hetta millum annað havt við sær, at ítróttur er ikki á tímatalvu skúlans longur.

Skúlaárið 2003/04 er tímatalið til Sands skúla játtað eftir somu reglum, sum til allar aðrar skúlar á somu støðd. Tá ið skúlin í september 2003 sendi Mentamálaráðnum yvirlit yvir tímanýtsluna sást, at nýtslan var hægri enn játtaða tímatalið, og tí hevur skúlin fingið boð um at taka nakrar tímar av tímatalvuni, til tess at fáa samsvar millum játtan og nýtslu. Skúlin ger sjálvur av, hvussu hetta verður gjørt, men hevur ikki heimild til at víkja frá galdandi tíma- og lærugreinabýti og harímillum frá ásetta tímatalinum í ítrótti. Rætta mannagongdin í hesum føri er tí at senda fyrispurningin til skúlaleiðaran í Sands skúla, av tí at tað er hann, sum hevur ábyrgdina av at gera ítøkiligu tímatalvuna.

Vónandi hevur Mentamálaráðið uppfylt ynski frá skúlastýrisliminum um eitt svar, ið vanlig fólk skilja, sum kravið frá greinskrivaranum var. Um ikki, so eru tygum altíð vælkomin at venda tygum til Mentamálaráðið fyri at fáa greiði á tí, tygum ikki skilja.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Kyndilsmessan harða

**Zakarias Wang**



Alkunnugt er, at fyri ár 1600 høvdu vit ein ódnarstorm á kyndilsmessu, har stórur skaði stóðst.

Nú í ár er eisini ein ring kyndilsmessa, tí tann meiriluti av Føroya fólki, sum er fyri at vit skulu gerast ein sjálvstøðug tjóð, er syndrað og farin í hvør sína ætt.

**Hvat er tað sum er hent?**
Fyri brátt seks árum síðani høvdu vit val, har ein meiriluti atkvøddi fyri Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkinum og Miðflokkinum, øllum teimum flokkum á tingi, sum ikki høvdu verið við til at gjøgnumføra heimastýrisskipanina. Tíverri varð Miðflokkurin ikki tikin við í samgonguna 1998, og tað gjørdi hana veikari beinanvegin.

Harumframt vísti tað seg skjótt, at nøkur av umboðum Fólkafloksins, høvdu misskilt hvat tað var flokkurin stóð fyri. Fólkaflokkurin varð jú stovnaður í 1939 við Jóannesi Paturssyni sum formanni fyri at vinna Føroyum fullveldi. Nú ið høvi var at røkka hesum máli, vóru tað nakrir fólkafloksmenn ið tóktust at hava kálvahjarta.

Orsøkin til hetta er, at tað eru alt ov nógv fólk í Føroyum, ið halda at vit hava tað gott undir núverandi skipan okkara. Tað, hesi fólk føra fram, er, at vit sum er fáa pengar úr Danmark, og at tað er gott fyri okkum at fáa hesar pengar og at vit høvdu liðið hungur og hall, og í hvussu so er farið á húsagang, um so var at vit ikki fingu hendan stuðul.

Tað krevur eitt ávíst arbeiði at læra at skilja, at hetta er lygn. Vit vita, at teir, ið stýra Danmark og gera av hvat skattakrónurnar hjá donsku skattgjaldarunum fara til, hava slíkt búskaparligt innlit, men teirra fremsta áhugamál er ikki at síggja til, at Føroya land og tjóð trívast væl. Teir skulu hugsa um, hvat ið er best fyri teir, og tað er møguligt at tað er betri fyri teirra skattgjaldarar at tað ikki gongur væl í Føroyum. Teir vóru í hvussu so er ovurhonds glaðir, tá tað eydnaðist teimum at koyra okkum á húsagang fyri nøkrum árum síðani, so at teir fingu hópin av góðari arbeiðsmegi úr Føroyum.

Somuleiðis mugu tað vera nógvir føroyingar við útbúgving, sum hava lært hvørjar skaðiligar avleiðingar danski stuðulin til Føroyar hevur fyri okkara vinnulív. Men hesir føroyingar siga ikki serliga nógv, og fáir eru at síggja millum okkara politikarar. Onkur glotti er tó, og serliga minnist eg við frøi eina fráboðan, sum Unga Sambandið kom við fyri nøkrum árum síðani, har teir hildu at vit ongan blokk skuldu hava.

Men annars sleppa politikarar okkara sær undan at seta seg inn í viðurskiftini, og greiða ikki tjóð okkara frá, at skulu vit liva við sømd í føðilandinum, so skulu vit hava eitt kappingarført vinnulív, og fáa vit stuðul uttanífrá, gerst vinnulívið ikki ført fyri at standa seg í nakrari kapping, men noyðist sjálvt at fáa studning. Hetta vil siga, at tær almennu inntøkurnar, sum annars høvdu kunnað verið nýttar til tey endamál, sum veljararnir vilja hava at tað almenna tekur sær av, ikki eru nóg stórar, tí tær fara í tað botnleysa karið, ið almennur stuðul til undirskotsvinnur er.

Men av tí at teir, ið skil hava fyri hesum samanhanginum, ikki stíga fram og greiða fólki frá, at soleiðis er verðin nú einaferð, so liva fólk í tí sáligu trúgv, at tey gerast betri fyri við at fáa studning úr Danmark. Av tí sama gerast politikarnir bangnir fyri at gera tað sum rætt er, og tað hevði verið umgangandi at yvirtikið alt sum yvirtakast kann, so vit ikki fáa so nógvar pengar uttanífrá.

Tíverri hava vit longu gloymt tey árini, ið vit høvdu eina so stóra skuld, at renta og avdráttur av henni fór avstað við øllum tí danska stuðlinum. Tá høvdu vit ikki ráð at geva stuðul til vinnulívið, og tá gekk tað við rúkandi ferð at fáa gongd í okkara vinnulív. Hetta próvar betri enn nakað annað, hvør dugnaskapur býr í tjóð okkara, bert vit høvdu slopppið burtur úr tí hafti, sum danski stuðulin til okkum hevur lagt okkum í.

Men við at óttast tað, ið einki er at óttast fyri, hava nakrir politikarar í Fólkaflokkinum sett allan flokk sín í váða, tí tað er ikki at spæla við hjá einum flokki at ganga ímóti sjálvum grundarlagi floksins. Tað er tí mangt, sum bendir á, at tann skaði, sum stendst á hesi kyndilsmessu, fer at verða Fólkaflokkinum fyri.

# Víst sigur Óli Jacobsen ikki ósatt!

**Óli Jacobsen**



Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, leggur meg undir at siga ósatt út frá eini forsíðutilvísan (!) á FF-blaðnum, sum sigur, at fiskidagaskipanin verður mótarbeidd av leiðandi fiskifrøðingum.

»Mótprógvið« hjá Hjalta er, at teir hava verið tríggjar ferðir uttanlands í 2003 og greitt frá skipanina.

Hetta prógvar ikki nakað sum helst. FF-blaðið hevur í 10-tals greinum undirbygt síni sjónarmið um leiklutin hjá Hjalta & co. Og hetta eru sjónarmið, sum fiskivinnufólk yvirhøvur taka undir við.

Eftir øllum at døma hevur Hjalti ikki lisið, hvat ið hevur staðið inni í blaðnum um hetta mál.

Men her skal bert verða nevnt, at meðan Hjalti í síni grein skrivar, eins og hann hevur ført fram ótaldar ferðir, um ta "alsamt **vaksandi** veiðiorku í veiðuflotanum", so vísa almenn hagtøl hjá ICES, at veiðutrýstið á toski er **lækkað** við 36% síðan fiskidagaskipanin varð sett í verk. Hóast hetta hevur tilmælið hjá FRS hvørt ár verið ein skerjin í dagatalinum við 20-30%. Hevði hetta verið fylgt, hevði eingin fiskidagaskipan verið í dag.

So tað er spurningurin um júst Hjalti er tann rætti at gera meg til lygnara.

Meira skal ikki sigast um tað.

# C-vitaminirnar hjá John vóru klænkibollar

**Niels Uni Dam**



Eg vil minna John Johannesen á, at hann fyri tveimum vikum síðan lovaði okkum c-vitaminir til tónleikin. Tí tykist tað heldur ódámligt, at hann hevur avreitt tónleikaviðurskiftini til ein flokk sum er ímóti eini frælsari mentan, til ein flokk sum kann finna uppá at seta ein mann sum Jógvan á Lakjuni at umsita mentamál. Tað er John sum hevur givið teimum fullmakt at velja Jógvan.

Tjóðveldisflokkurin hevur umsitið mentamál í seks ár. Hesi árini er játtanin til tónleik fleirfalda, og stórar ætlanir vóru fyri komandi tíð. Nú sigur Anfinn Kallsberg at politikkurin skal endurskoðast. Hyggjast skal hvat fæst fyri hvørja krónu. Samgongan skal spara fyri at fíggja ein skattalætta til tey ríku. Jógvan hevur fyrr úttala seg ímóti tolsemi og fyri avmarkan av talifrælsinum.

Góði John hatta ljóðar sum ræðuliga súrar c-vitaminir. Tað tók ikki langa tíð, áðrenn tíni lyfti duttu á gólv, tínar c-vitaminir eru klænkibollar.

Vinarliga ein skuffaður Niels Uni Dam

# Skeiv adressa, Niels Kári

**Jógvan Jacobsen**

**Aftursvar til viðmerking til mín frá Niels Kára Nielsen sambandsmann.**

Eg skrivaði herfyri viðmerking í Dimmalætting og á heimasíðuna hjá Unga Tjóðveldinum, www.ut.fo, um úrslitið av løgtingsvalinum. Eg legði dent á, at loysingarflokkarnir fingu meir enn helmingin av atkvøðunum.

Viðmerkingin hjá mær fekk Niels Kára Nielsen sambandsmann upp úr stólinum. Hann er ikki samdur við mínari tulking av løgtingsvalúrslitinum. Og tað er eisini í lagi.

Niels Kári Nielsen heldur áfram við at brigsla mær nøkur ting um førda politikkin hjá Fólkaflokkinum og Fullveldissamgonguni. Tað er ikki í lagi.

Hvørki eg ella Unga Tjóðveldið hava nakað við Fólkaflokkin at gera. Eiheldur vóru eg ella Unga Tjóðveldið partur av fullveldissamgonguni frá 1998 ella 2002.

Tað tykist sum Niels Kári eisini hevur hug at blanda Unga Tjóðveldið við Tjóðveldisflokkin og meg sjálvan við Høgna Hoydal. Tað er heldur ikki í lagi.

Unga Tjóðveldið er sjálvstøðugt ungmannafelag, hvørs endamál at virka fyri føroyskum fullveldi. Tjóðveldisflokkurin er politiskur flokkur við sama endamáli. Unga Tjóðveldið stendur ikki til svars fyri útsagnir og gerðir Tjóðveldisfloksins. Tað sama er galdandi hinvegin.

Eg er eg. Høgni er Høgni. Vit eru hvør sín persónur. Eg standi ikki til svars fyri gerðir ella útsagnir Høgna Hoydals. Og tað sama er galdandi hin-vegin.

Hevur Niels Kári nakrar viðmerkingar til Høgna Hoydal ella til Tjóðveldisflokkin, so hevði verið snildari at latið tær til Høgna og Tjóðveldisflokkin og ikki til mín og Unga Tjóðveldið. Men tað torir hann kanska ikki. Og tí leggur hann eftir mær.

Men eftirsum, at Niels Kári absolut vil sleppa at kjakast um fólkaatkvøður í Føroyum, so vil eg upplýsa honum nøkur ting.

Unga Tjóðveldið bardist av øllum alvi fyri at fólkaatkvøðan um fullveldistilgongdina skuldi fara fram. 3. mars 2001 hevði Unga Tjóðveldið stóran fólkafund á Vaglinum í Havn fyri at mótmæla afturtøkuni av fólkaatkvøðuni. Hvat síðani hendi hevur einki við meg ella Unga Tjóðveldið at gera.

Stóð tað upp til mín, fekk Anfinn Kallsberg sekkin sama dag, sum hann avlýsti fólkaatkvøðuna. Men soleiðis bleiv ikki og eg fái einki gjørt við tað.

Ein fólkaatkvøða var leygardagin 14. september 1946 um heimastýri ella loysing. Fólkið vrakaði heimastýri og valdi loysing. Menn fóru beinanvegin í gongd við at fremja fólksins vilja. Men fólkið var sett til viks av Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og danska yvirvaldinum við danskari hermegi. Soleiðis virkar fólkaræði í danska ríkinum.

Danska grundlógin hevur fleiri ferðir verið til fólkaatkvøðu í Føroyum í sambandi við at broytingar hava verið gjørdar. Svarið hevur verið nei hvørja ferð. Men hóast hetta eru broyttar danskar grundlógir lýstar at galda í Føroyum.

Erlendur Patursson segði í 1946, at fólkaræði uttan fult fólkaræði er sum bátur uttan nøgl. Eg eri so púra samdur.

Tað einasta sum eg og Unga Tjóðveldið vilja, er at skipa fult føroyskt fólkaræði. Eina føroyska republikk. Eins og t.d. Ísland og Finnland.

Men Niels Kári, um tú hevur nakrar viðmerkingar til mín, so kom endiliga við teimum. Men eg eri bara eg, og standi ikki til svars fyri gerðir og útsagnir hjá øðrum fólkum. Tað má einhvør klára at skilja.